# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Evnisdagur um Føroyar og vælferðina

Vælferðarsamfelagið Føroyar verður í dag sett á dagskránna á stórum fundi í Norðurlandahúsinum. Tað er Samtak, sum skipar fyri og áhugavert verður at frætta nærri frá hesum tiltakinum í miðlunum komandi dagarnar. Eisini Miðlahúsið er umboðað, so her verður meira at frætta í okkara miðlum eisini.

Fyrireikararnir siga í skrivi, at teir fara úr ymiskum sjónarhornum at lýsa støðuna, tíðarrákið, avbjóðingarnar og hvørja leið vit eiga at ganga í menningini av okkara vælferðarsamfelag.

Á evnisdegnum verður m.a. varpað ljós á hesar spurningar: hvussu sær vælferðarsamfelagið Føroyar út? Hvat er vælferð anno 2010? Hvørjar eru avbjóðingarnar hjá vælferðarsamfelagnum Føroyar? Hvussu ávirka okkara liviumstøður okkara lívsmøguleikar og lívsgóðsku? Hvussu ávirkar tað børnini at vaksa upp í familjum, ið hava fíggjarliga svárar umstøður? Hvør er uppgávan hjá fakfelagsrørsluni og felagskapum í einum vælferðarsamfelagi og hvussu kunnu hesi verða við til at tryggja, at vit hava eitt samfelag, har øll hava javnbjóðis møguleikar? Hvørja leið eiga vit at ganga, nú nýggj forsorgarlóg skal smíðast? Hvørja ábyrgd hava vit sum einstaklingar í vælferðarsamfelagnum?

Fyri at svara spurningunum hava fyriskiparnir fingið eitt væla lið av góðum fólkum. Eitt nú kenda sosiologin Emilia van Hauen, sum fer at tosa út frá heitinum: Farvæl egoveitsla, góðan dag endamál og felagskapur. Eitt nýtt tíðarrák er ávegis, sum snýr seg um at gera mun. Tað er ikki longur nóg mikið at verða nakað, tú mast gera nakað. Emilia van Hauen nemur í sínum fyrilestri við, hví hetta tíðarrákið er ávegis, og hvat tað krevur av okkum.

2010 er enn ungt, og tað boðar frá góðum, at skjøtil verður settur á enn eitt ráðstevnuár við so týðandi tiltaki sum hesum Samtak hevur fingið í lag. Brúk er fyri, at ljós verður varpað á umrøddu mál ikki bert á eini ráðstevnu sum hesari men eisini aftaná í fjølmiðlunum og ikki minst á løgtingi.

**Sosialurin**

## Solodansur Edmunds



**JOHN WILLIAM JOENSEN**
Formaður í Norðoya Sambandsfelag

Tá Edmund Joensen roynir seg í politiskum ballettdansi, eru piruettirnar altíð øðiligar. Sum elefantur í postalínshandli dansar hann nú aftur. Mangt kann sorlast í hansara óstýriligu umdreyningum. Havast skal kortini í huga, at hetta er rein solouppvísing.

Edmund hevur roynt seg áður:

– Hann hevur útmerkað seg við at vera ímóti Vága- og Norðoyatunlunum, hann hevur ongantíð torgað sitandi løgmann, og nú vil hann niðurleggja Klaksvíkar- og Suðuroyar Sjúkrahús. – Vit spyrja: til gagns fyri hvønn?

Tá Lisbet L. Petersen fór frá sum formaður Sambandsfloksins, og tað gjørdist greitt, at flokkurin fór at velja Kaj Leo Johannesen sum eftirmann, gjørdist samstundis greitt, at Edmund undir ongum umstøðum fór at stuðla floksleiðsluni. Hetta lyfti hevur hann hildið. Neyvan til gagns fyri Sambandsflokkin.

Vit, sum ikki búgva inni á miðøkinum, eru so von við hansara høgg. Vit minnast, hvussu hann stríddist ímóti Vágatunlinum og gav táverandi landsstýrismanni í Vinnumálum sekkin fyri at hava sett arbeiðið uppá Vágatunnilin í gongd.

Eisini minnast vit, hvussu hann í føroyskum og útlendskum fjølmiðlum gjørdi grin burtur úr royndunum at fáa Norðoyatunnilin settan á politiska dagsskrá.

Teir nýggjastu tankarnir hjá Edmundi um at niðurleggja smærru sjúkrahúsini, kunnu ikki verða til nakað annað enn at provokera – ein óvirðilig roynd at vinna persónligar atkvøður í hansara nýggja atkvøðudepli - Tórshavn.

Góði Edmund - hvat við at komið við kritikki, politiska skipanin kundi brúkt og ikki bara skotið frá hoftini við hugskotum, sum einans sáa mistreysti og ótta?

Hvat um tú t.d. byrjaði við at rationaliersa teg sjálvan. Eg meini, tú ert løntur bæði úr statskassa og landskassa, og sostatt átti tjóðin at væntað sær meira av tær. - Stórur partur av fólkinum hevur trupult við at halda fast við ta einu lønina. Tín óstortligi solodansur hevur einki við sambandspolitikk at gera og gagnar ikki flokkinum.

At miðsavna alt skúlaverkið í nakrar fáar »effektivar« kraftdeplar - sum m. a. leiðslan í Føroya Lærarafelag mælir til – ljóðar ikki bert populistiskt – men fer neyvan at føra til nakra rationalisering.

Skúlaverkið verður ikki bíligari at reka – og samstundis hevur ein kvett høvdið av fleiri vælvirkandi skúlaeindum bæði í býum og bygdum.

## Elektron-avmynstring Eftirlýsing av upplýsingum



**HANUS VANG**

Í 1994, í 2002 og nú í 2010 vilja peningastovnar flyta tað arbeiði, Elektron ger, av landinum. Vandi er fyri, at munandi partur av eini 100 arbeiðsplássum sostatt vera óneyðug her á landi.

Higartil hava teir ikki kunna gjørt hetta ímóti føroyska samfelagnum, tí lógarverkið hevur forðað tí.

Er nakað broytt í lógarverkinum síðani 2002 sum ger, at tað nú kann gerast?

Annars sigst, at útflaggingin kostar trífaldar miljónir.

Um nú tølini vísa, at tað er munandi bíligari í víðastu merking (cost benefit á juppamáli) at flyta hesi arbeiðspláss av landinum, so stingur spurningurin seg upp, um ikki tað so eisini er dupult so snilt at niðurleggja føroyska bankakervið og hava lán og alt annað í danska ella skandinaviska kervinum. Ella onkra aðrastaðni.

So fara vit at spara almikið av peningi. Eitt nú tveyfaldaðar miljónir til leiðslusamsýningar.

Um vit bankakundar eisini flagga út, so er ein møguleiki, at fremmandu bankarnir fara at seta gongd á og brúka Elektron, tí felagið er her.

Nevnir 2015-visjónin ikki, at vit um fimm ár vera fremst á telduøkinum og vera serveitarar til smá samfeløg um allan heim?

Tað sær als ikki so út við hesi gongd.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.